**Alitíðindi**

www.fiskaaling.fo NR 2 2003 430 HVALVÍK

# Smoltstøðirnar

## Hagtøl fyri smoltstøðirnar í 2002 og fyrru helvt av 2003

*Andrias Reinert*

Samandráttur

Støðan í alivinnuni á sjónum seinnu árini hevur, sum vera man, álvarsligar avleiðingar fyri arbeiðið á flestu smoltstøðunum.

***Stígur komin í***

Samlaða rúmdin í kørum at ala síla- og laksamaðkapirrur í er tó vaksin í 2002 í mun til í 2001. Broyting er ikki í nótunum at ala fisk í á SEV-brunnunum.

***19,7 mió. smolt og síl í 2002***

Sama tal av laksasmolti fór í nótirnar á sjónum í 2002 sum árið fyri, men "bert" 2,9 mió. síl. Tilsamans 19,7 mió. fiskar fóru sostatt á sjógv í 2002, at meta saman við 21 mió. fiskar í 2001, 19,3 mió. í 2000, 15,5 mió. í 1999 og 13,3 mill í 1998.

***11,1 mió. smolt og síl í 2003***

Trupla støðan í alivinnuni trý tey seinastu árini ger av álvara um seg á smoltstøðunum í 2003. Bert 7,2 mió. laksasmolt eru farin á sjógv fyrru helvt av 2003, og í september er metingin á smoltstøðunum, at tær sleppa av við 2,8 mió. afturat í árinum. Talið av ælabogasílum, sum er farið á sjógv í 2003, er minkað niður í 1,1 mió.

Virksemið er tí skert munandi á fleiri smoltstøðum, og í september 2003 var eingin fiskur í kørunum á seks smoltstøðum.

## Stígur komin í virksemið á smoltstøðunum

*Framleiðsluførið økt í 2003*

Á Mynd 1 síggja vit, at rúmdin at ala smáfisk í kørum á smoltstøðunum er økt nakað í 2003. Hetta stendst, sum vera man, av at stór kør, sum hava verið í gerð, nú eru tikin í nýtslu, ella eru klár at taka í nýtslu. Støðirnar, sum ala smolt og síl í nótum á SEV-brunnum, hava ikki lagt fleiri nótir út í 2002.




*Mynd 1. Rúmd av alikørum á øllum smoltstøðunum tilsamans og av nótunum, sum verða nýttar at ala laksasmolt og síl í á SEV-byrgingunum 1995-2002.*

Rúmdin á alikørum á øllum smoltstøðunum tilsamans er í 2002 økt úr 21.830 $m^3$ upp í 25.104 $m^3$, men á seks smoltstøðum kring landið standa kørini tóm við ongum fiski í september 2003.

## Lívfiskur

*Tvær smoltstøðir strúka laks*

Meðan tríggjar smoltstøðir struku laks í 2001 og lótu rogn, laksayngul og maðkapirrur til hinar smoltstøðirnar í landinum, hava bert tvær støðir strokið laks í 2002 og 2003. Bert ein støð hevur strokið ælabogasíl á vári 2001, 2002 og 2003.

## Laksasmolt í 2002

*17 mió. smolt í 2002*

Tilsamans lótu smoltstøðirnar 16,8 mió. laksasmolt í 2002 í mun til 16,9 mió. í 2001, 15,7 mió. í 2000 og 14,8 mió. í 1999.

*10 mió. í 2003*

Fyrru helvt av 2003 fóru 7,2 mió. laksasmolt á sjógv, og í september mettu smoltalarar, at umleið 2,8 mió. fóru at verða latin alarum annað hálvár, ella íalt slakar 10 mió. laksasmolt í 2003 umframt 1,1 mió. síl.

***Metingar á smoltstøðunum og søla***

Tá farið verður undir eitt nýtt ár, meta smoltstøðirnar um, hvussu nógvan fisk tað er ráðiligt at ala í árinum. Í september, tá stórur partur av fiskinum er farin á sjógv, verður nýggj meting gjørd. Henda seinna metingin hevur vanliga verið nakað minni, og hevur svarað væl til samlaðu søluna frá smoltstøðini í árinum. Á Mýnd 2 vísa stabbarnir metingar og sølu tvey tey seinastu árini, og metingarnar fyri laksasmolt og síl, sum smoltstøðirnar hava gjørt í 2003.




*Mynd 2. Metingar av framleiðslu á smoltstøðunum í januar eru vanliga nakað hægri enn metingar í september, sum hinvegin hava svarað væl til veruligu søluna av laksasmolti og sílum í árinum.*

Her eru tað tey ivasomu útlitini, ið hava verið í alivinnuni, sum gera, at nógv minni tal av fiski fer á sjógv í 2003 enn undanfarin ár. Eitt nú verður fiskur, sum var ætlaður at fara á sjógv á heysti 2003, í fleiri førum gangandi á smoltstøðini, og alarar vóna, at tað umsíðir fer at bera til at koppseta fyri ILA í 2004.

***Hvussu stór eru smoltini ?***

Nógv tos hevur í mong ár verið um fyrimunir av at koyra færri, men væl størri smolt á sjógv, eitt nú fyri at stytta tíðina, sum fiskurin skal alast á sjónum. Heldur striltið hevur tó gingist at fáa gongd á hetta broytta arbeiðslag. Fyrsta árið, ið meira enn helvtin av smoltunum eru omanfyri 50g, var 2002. Á Mynd 3 eru smoltini býtt upp í fýra bólkar eftir stødd:

- upp til 50g,
- 50-60g,
- 60-100g
- smolt omanfyri 100g.

Sera lítil partur av fiskinum, sum er farin á sjógv, hevur verið omanfyri 100g undanfarin ár, men í 2002 var hesin bólkur vaksin upp í 8,8% av samlaða talinum.




*Mynd 3. Lutfallið í prosentum millum ymiskar støddarbólkar av laksasmolti, sum eru farin á sjógv frá 1997 til 2002.*

***Nær fara smoltini á sjógv ?***

Í 1994 fóru alarar av álvara at koyra smolt á sjógv á heysti bert "summargomul". Hesin arbeiðsháttur vant skjótt upp á seg, og meira enn 60% av fiskinum, sum fór á sjógv í 1997 og 1998, var heystsmolt (S½). Í 1999 og 2000 var býtið javnt millum vár- og heystsmolt. Síðan hava smoltini, sum fara á sjógv um várið, aftur verið fleiri í tali, og vársmoltini vórðu 62,3% av samlaða talinum í 2002.

Á Mynd 4 er víst hvussu mong smolt eru farin á sjógv hvønn árs-fjórðing sær seinastu 6 árini. Sí eisini Mynd 7 á síðu 7.




*Mynd 3. Laksasmolt latin alarum á sjónum frá 1997 til og við 2002 hvønn ársfjórðing sær.*

## Goymsla pr. 31.12.2002.

***Færri rogn***

Smoltstøðir, sum ala í nótum á SEV brunnum og onkrar av teimum smærru, sum ala í kørum, keypa yngul/maðkapirrur frá øðrum alarum at ala víðari til smolt. Flestu smoltstøðirnar hava tó undanfarin ár keypt laksarogn, tá tey eru komin í eyga.




*Mynd 5. Rogn hava verðið klækt á 14-15 smoltstøðum. Stabbarnir vísa broytingar í nøgd av laksarognum mált í litrum, sum eru løgd til klekingar 1996-2002 á hesum smoltstøðum.*

Á Mynd 5 er gjørt upp, hvussu mangar litrar av laksarognum smolt-støðir hava lagt inn til klekingar hvørt heystið frá 1996, býtt upp soleiðis: 1) færri enn 200 litrar, 2) millum 200 og 300 litrar o.s.fr. Á heysti 2001 løgdu 3 smoltstøðir oman fyri 1000 litrar av laksarognum til klekingar.

***38 mió. laksa- og sílarogn***

Laksarognini, sum smoltstøðirnar løgdu til klekingar á heysti 2002/vári 2003, vórðu, tá tey vóru komin í eyga, gjørd upp til 5.455 litrar í alt. Her rokna vit við, at tað eru 6000 rognkorn í hvørjum litri, og svarar tað til, at 33 mió. eygarogn vórðu nýtt til aling av laksasmolti í Føroyum, umframt 475 litrar ella 4,8 mió. rognkorn undan ælaboga-sílum á vári 2002. Tilsvarandi tøl fyri nøgd av rognum undanfarnu árini eru avmyndað sum stabbar á Mynd 6.

Hesi tøl, um nøgd av rognum hvørt árið, eiga at verða tikin við ávísum fyrivarni. Nú smoltstøðir í stóran mun eru farnar at klekja rogn í køldum vatni, er í summum førum lítið komið burtur úr hesum rognum, og okkurt dømi er um, at somu rogn av misgávum eru tald við bæði um heystið og "á goymslu" várið eftir.




*Mynd 6. Nøgdin av laksa- og sílarognum, komin í eyga, sum eru løgd til klekingar á smoltstøðunum kring landið 1996 –2002.*

***1,7 eygarogn til hvørt smoltið 1996-2001***

Telja vit saman í Talvu 1, síggja vit, at fyri árini 1996-2001 komu 83 mió. smolt burtur úr 139 mió. eygarognum ella við øðrum orðum, at vit hetta tíðarskeið í miðal hava nýtt 1,7 eygarogn til hvørt smoltið, sum er farið á sjógv.

***4 eygarogn til hvørt smoltið í 2002 ?***

*Talva 1. Tal av eygarognum í mun til ald smolt pr. yngulárgang frá 1996 til 2003 býtt á heyst- og vársmolt - (metingar við skráskrift).*

| Eygarogn heystið fyri Mió. | Yngul-ár-gangur | S½ á sjógv sama ár mió. | S1 á sjógv árið eftir mió. | Smolt íalt pr. yngul-árgang mió. | Eyga-rogn pr. smolt |
|---|---|---|---|---|---|
| 32,7 | 2003 | *2,8* | *?* | | |
| 49,7 | 2002 | 5,3 | 7,17 | 12,5 | 4,0 |
| 36,3 | 2001 | 7,5 | 10,5 | 16,8 | 2,0 |
| 26,8 | 2000 | 7,9 | 9,4 | 17,3 | 1,5 |
| 22,6 | 1999 | 7,2 | 7,8 | 15,0 | 1,5 |
| 20,9 | 1998 | 7,8 | 7,6 | 15,4 | 1,4 |
| 17,4 | 1997 | 5,2 | 4,8 | 10,0 | 1,7 |
| 14,9 | 1996 | 3,8 | 3,5 | 7,3 | 2,0 |

At so fá smolt eru farin á sjógv av 2002 “yngul-árganginum”, er sjálvandi meira orsakað av sera vánaligu gongdini í alivinnuni á sjónum, enn av trupulleikum við alingini á smoltstøðunum.




*Mynd 7. Talið av smolti og sjóbúnum sílum, sum smoltstøðirnar hava latið árini frá 1991 til og við vársmolti og síl í 2003, og forsagnir fyri heystsmolt seinnu helvt av 2003.*

Árini 1992-94 fóru umleið 5 mió. fiskar á sjógv um árið. Henda nøgd ferfaldaðist árini 2000-2002 tá um 20 mió. laksasmolt og síl fóru á sjógv á hvørjum ári. Skerjingarnar, sum nú standa fyri, gera, at bert góð helvt av hesi nøgd fer á sjógv í 2003.

Ikki síðan 1997 hava alistøðirnar á sjónum fingið so lítið tal av fiski, sum metingarnar fyri 2003 boða frá.

## Ælabogasíl

*Skiftandi áhugi at ala síl*

Sílaalingin er eitt gott dømi um, hvussu sera torført tað er at leggja langtíðar-ætlanir í hesi vinnu. Sílaprísurin hevur sum kunnugt í mong ár ligið væl niðanfyri laksaprísin, og sílaaling hevur bert verið við-fáningur í mun til aling av laksi í Føroyum.

Í 1999 hendi síðan tað, at útflutningsprísurin á frystum sílum í miðal varð heilar kr 27,60 samanborið við kr 24,66 fyri frystan laks og kr 23,17 fyri ísaðan laks. Í 2000 var miðalprísurin fyri fryst síl kr 27,87.

Alarar, sum høvdu síl at lata hesi ár, vunnu væl av peningi, og áhugin fyri sílum vaknaði av álvara. Eisini vistu alarar nú av egnum royndum, at fleiri av sjúkunum, sum hava verið til stóran bága fyri laksaalingina, ikki sýnast at rína við sílini í sama mun.

Broytingar í prísi á frystum laksi og frystum avhøvdaðum sílum hesi ár 1998-2002 eru lýstar á Mynd 8.




*Mynd 8. Útflutningsprísir fyri hvørt kilo av frystum laksi mett saman við prísin fyri avhøvdaði fryst síl frá 1998 til 2002.*

Óføri sílaprísurin økti alt fyri eitt eftirspurningin eftir rognum undan ælabogasílum.

***809 litrar av sílarognum í 2001***

***172 litrar í 2003***




*Mynd 9. Mió. av eygarognum undan ælabogasílum, sum eru løgd til klekingar, og talið av sílum, sum eru farin á sjógv, 1996-2003.*

Tá sílaprísurin rapaði í 2001 og síðan fór enn longur niður í 2002, minkaði áhugin fyri sílum aftur skjótt, sum avmyndað á Mynd 9. Bert 172 litrar av sílarognum vórðu lagdir til klekingar í 2003 í mun til ávikavist 475, 809, 735, 300, 115, 65 og 200 litrar sjey tey undanfarnu árini.

***4 mió. síl á sjógv í 2001***

Einans tvær smoltstøðir fingust í mong ár við at seta síl við.

Prísvøksturin í 1999 elvdi til, at fýra smoltstøðir hetta ár lótu slaka mió. av ælabogasílum til alistøðir á sjónum. Í 2000 lótu 8 smoltstøðir 3.6 mió. síl og í 2001 fóru stívliga 4 mió. ælabogasíl á sjógv. Prísfallið minkaði síðan aftur talið av sjóbúnum sílum niður á 2,9 mió. 2002.

***1,1 mió. síl í 2003***

Í 2003 hevur bert ein smoltstøð keypt sílarogn og ein støð smáar ælaboga-maðkapirrur. Í september fóru 1,1 mió. ælabogasíl á sjógv, og fleiri síl eru ikki at koyra í ali-nótirnar á sjónum í 2003.

Nú betur prísur enn einaferð hevur verið at fingið fyri sílini, í mun til laksaprísin, kann áhugi fyri sílarognum og smásílum aftur fara at vaksa.

-------------------------

**<u>Forsøgn – tøka av alifiski í 2003</u>**




*Mynd 10. Tøka av alifiski.- Tøl frá Havbúnaðarfelagnum 2000-2002 og forsøgn fyri tøku í 2003. Forsøgnin byggir á 1) tølini sum felagið hevur savnað inn til og við viku 42 í 2003, 2) at sami prosentpartur av fiskinum er tikin í hesum tíðarskeiði, sum í sama tíðarskeiði í 2002.*

***Tøkk til:***

*Alarar fyri góða undirtøku við spurnarbløðunum og ómak at svara teimum mongu spurningunum.*

*Manning á P/F Fiskaaling fyri rættlestur og góð ráð.*

---

\- Onkur tøl eru rættað / dagførd í mun til fyrr útsend Alitíðindi -